# HÚSAST 4 UNDIR



Aðrastaðni í blaðnum verður tosað um skúlan á Húsum og framtíðina hjá hesi lítlu bygdini á eini av útoyggjum okkara.
Ein veruleiki er, at ein rættiliga stórur partur av børnunum eru í og undir skúlaaldur. Veruleikin er, at tað eru sjey børn í bygdarskúlanum og fýra børn undir skúlaaldur. Av teimum eiga Jona í Lon og maðurin tvey teirra.
Rákið í dag gongur ímóti størri skúlaeindum, og at niðurleggja teir smærru.
Í Kalsoynni eru tveir bygdaskúlar – á Húsum og í Mikladali. Og her bendir mangt á, at annar skúlin má lata aftur.
Fyri mong á Kalsoynni er tað ein spurningur, um ein ikki átti at havt henda eina skúlan liggjandi á Syðradali, har ferjulegan er.
– Haðani frá er í øllum førum ikki ov langt at flyta lærararnar millum, vísir Jona á.

**BARNAVINARLIGT**

*– Tað er ein framtíð fyri bygdini, - tað bæði halda vit og vóna vit, sigur 28 ára gamla húsmóðurin, Jona í Lon. Hon eigur trý børn, sum øll trivast í hugnaligu bygdini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**TRÍVIST HEIMA**

*– Eg trívist sera væl sum heimagangandi húsmóðir, sigur Jona í Lon, sum er mamma at trimum børnum á Húsum. - Tað er eisini gott hjá børnunum at vita, at onkur er við hús tá tey koma inn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*